# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Jóna Kristin Thomsen:

## Listaframsýning í Mentamálaráðnum

Mánadagin 3. juli 2006 læt Jóna Kristin Thomsen upp forvitnisliga listafram–sýning í Mentamálaráðnum. Framsýningin, sum eitur "Í rúmi", verður víst á 5 sjónvarpsskermun. Fram–sýningin er opin til 7. juli 2006, kl. 15.

Jóna Kristin Thomsen er 26 ára gomul og lesur sálarfrøði og heimspolitikk í London. Hon er rytmiskur fimleikari og dansari og hevur verið í Danmark, London og stutt tíðarskeið í New York og nomið sær útbúgving inn–an dans. Hon hevur verið partur av fleiri uppseting–um í Føroyum, m.a. Josef og litfagra dreymakotið, gøtusjónleiki á ólavsøku, Listastevnuni, "Hendur og Hugflog", og henni dámar sera væl at arbeiða innan ymiskar dansistílar, bæði sum dansari og koreo–grafur. Hon hevur eisini verið venjari innan dans og fimleik í fleiri tíð–arskeið–um.

Eftir lokið Bachelourat kundi Jóna hugsað sær at hildið fram við listarligum arbeiði innan dansi, og serliga heldur hon sam–felagslig og sálarfrøðilig evni eru spennandi íblástur til hetta.



*Mánadagin læt Jóna Kristin Thomsen upp forvitnisliga og annarleiðis listaframsýning í Mentamálaráðnum*

**Dagurin í morgin**

**5. juli. Anshelmus.** Tað er allarhelst navnið á tí tiltikna guðfrøðinginum og erkabiskupinum í Canterbury, sum doyði í 1109.

### Andlát og jarðarferðir

**Anna Maria Jacobsen**, vanliga nevnd Mia á Heyggi, Selatrað, and–aðist sunnudagin 2. juli á Eysturoyar røktar- og ellisheimið, 92 ára gomul. Jarðarferðin verður hósdagin kl. 14 frá ellisheiminum í kirkjugarðin á Selatrað. Tey, ið vilja minnast Miu, kunnu lata eina peningagávu til felagið Javna.

**Torkil Mortensen**, ættaður av Tvøroyri búsitandi í Nærum, andaðist fríggjadagin 30. juni, 71 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Søllerød kirkju hós–dagin kl. 12.

Gallarí Oyggin, Tvøroyri:

## Pól Skarðenni við fjølbroyttari framsýning

Sunnudagin 2. juli læt Pól Skarðenni upp eina listaframsýning í Gallarí Oyggin á Tvøroyri.

Á framsýningini eru olju–málningar, har myndevnið er Suðuroyggin. Eisini hev–ur Pól nakrar abstraktar málningar við á hesi fjøl–broyttu framsýningini. Opið er allar dagar frá kl. 14-18. Framsýningin heldur fram



Jan Slættalíð:

## Prógv sum Master of Arts

Jan Slættalíð hevur tann 29. juni 2006 lokið prógv sum Master of Arts (M.A.) (Social Sciences) in Politics, við University of Glasgow í Skotlandi.



Hervið verður gjørt kunnugt fyri ætt og vinum, at kæri bróður okkara

**Sverri Eidesgaard**

ættaður úr Oyndarfirði, búsitandi í Keypmannahavn

andaðist fríggjadagin 30. juni, 80 ára gamal.

*Familjunnar vegna*

**Brynhild og Aðalbjørg**

## Árliga dansináttin á Øravík

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin 15. juli kl. 19.30 verður tann árlga dansináttin hjá dansifeløgunum í Suðuroy hildin á Hotel Øravík, har øll eru vælkomin.
Til døgurðan verða tríggir ymiskir rættir at velja ímill–um: lambasteik, oksasteik og fleskasteik.

Tekning fer fram hjá dansi–feløgunum í oynni ella hjá Hotel Øravík. Møguleiki er eisini fyri at gista á ho–tellinum. Kostnaðurin er kr. 180,-

Fyrireikarnir vóna, at nógv fólk koma til tiltakið.




Sunnudagin 2. juli 2007 varð kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Anna Maria Jacobsen**

Selatrað, (Mia á Heyggi)

heimkallað til Harran, 92 ára gomul.

Jarðarferðin verður hósdagin 6. juli kl. 14.00 frá Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi í kirkjugarðin á Selatrað.

*Familjunnar vegna*

**Diana, Lena, Ásbjørn, Tórur, Tróndur, Grímur, Mia, Dávur og Kári**

*Tey, ið vilja minnast Miu, kunnu lata eina gávu til felagið Javna.*